

*Petsi Tvørfoss vísti, at hon er ein frálík sangarinna*

*Mynd: Jonhard Hammer*

# Stórt og flott at uppliva Petsi á føroyskum palli

**Mentanarhúsið í Fuglafirði var leygardagin karmur um eina heimsfrumframførslu. Talan var um Petsi Tvøfoss, stjørnuna úr danska Melodi Grand prixnum. Hon hevði tvær konsertir við danska bólki sínum**

KONSERT
*Henny Olsen*

Petsi Tvørfoss, sum so meistarliga framførdi lagið "Mest naar det er regn" í danska Melodi Grand prixnum, hevði leygardagin tvær konsertir í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Petsi hevði ongantíð staðið á føroyskum palli sum solistur fyrr, men eftir hesar konsertir kann staðfestast, at hetta verður als ikki síðstu ferð.

## Alt var umboðað

Vit løgdu til merkis í Melodi Grand prixnum hennara reinu og kláru rødd, men at uppliva hana var nógv flottari.

Petsi legði út við stillum og til tíðir contry-aktigum tónum við bleytum trummuspæli og fantastiskum soloum av bæði guitarleikaranum og ikki minst keyboardspælaranum. Men at henni dámar fjølbroyttan tónleik, vísti hon væl. Frá stillum contry og enntá eini føroyskari vísu, fór hon yvir í rocktónleik og eisini gospelkendar tónar.

Hon sang einans coverløg hjá kendum sangarinnum, men hetta fer skjótt at broytast, tí hon hevur sagt frá, at hon nú er byrja at smíða síni egnu løg. Fyrimyndirnar hjá henni Jewel og Sissel Kyrkjebø vóru sjálvandi at hoyra, men eisini vóru tónar frá jazzsangarinnuni Norah Jones og kendu Dolly Parton, fyri ikki at gloyma grand prix lagið hjá henni "Mest naar det er regn," sum hon framførdi tvær ferðir.

## Komandi stjørna

Petsi dugir væl at framføra og livir seg ómetaliga vøl inn í sangirnar. Hon vísti, hvussu fantastiska væl røddin hjá henni er vand, so hon kundi rættiliga spíla seg út, hvat røddini viðvíkur.

Við hugnaligari og róligari atmosferu fingu hesir áhoyrarir alt, hvat man kann fáa á eini slíkari sitikonsert. Allur tónleikur var umboðaður og øll roedd hennara var nýtt.

Eitt skal tó leggjast afturat, at danski bólkur hennara spældi fantastiska væl. Við einastandandi soloum frá guitarleikara og keyboardleikara og ómetaliga góðari samanspæling millum allar, lyfti bólkurin Petsi upp á eitt ótrúliga høgt støði.

Eingin ivi um, at Petsi hevur alt, sum skal til, fyri at gerast stjørna. Dygdina og evnini kann eingin taka frá henni.

NISSAN TERRANO 3.0 160 hk



Bilurin er frá august 2002
Koyrt 24.000 km
Sera vælhildin!

Til sølu um hóskandi boð fæst
tel 220 511

